# VIÐMERKINGAR

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
EIRIKUR@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

## Hvussu varð valt út

Tað gevur eina óhugnaliga mynd av einskiljingartilgongdini í Føroya Banka, nú tað er greitt, at einstakir útvaldir hava fingið í posa og sekk. Matematiskt skuldi tað í øllum førum verið ein ómøguligheit, at einstakir eigarar fingu 7,20% av partabrøvunum, tá samlaða útboðið varð yvirteknað 26 ferðir. Og tá verður bara tosað um tey 60%, sum Fíggingargrunnurin seldi í fyrsta umfari.

Eftir standa spurningarnir um, hví og hvussu tvey feløg eru útvald. Tað er ein spurningur, sum Fíggingargrunnurin eigur at svara Føroya fólki. Og tann spurningurin gerst ikki minni áhugaverdur, tá fíggjarstjórin, sum varar av øðrum felagnum, í Útvarpinum kundi staðfesta, at bankin er seldur ov bíliga. Og at smáliga b‡tið millum áhugaðu keypararnar var at halda fólk fyri gjøldur. Hvør skal sæta sær, verður sagt, men máti má vera við at halda fyri gjøldur. Serliga tá ein sjálvur so ruddiliga er settur millum tey útvaldu. Og enn størri undran vekir tað, tá sami maður fyri fáum vikum síðani kom við inniligari áheitan um, at bankin fyri alt í verðini ikki mátti seljast ov d‡rt.

Gjørd gerð fær onga vend, men tað er tó hugagott at staðfest, at onkrir av politikkarunum okkara eisini hugsa solidariskt og við samhaldsfesti. So stórur, sum áhugin var, so vildi tað sømt seg, um smærru íleggjararnir fingu møguleikan at teknað tey 600.000 partabrøvini, sum heimild er at selja afturat. Og Óli Breckmann eigur rós uppiborið, nú hann talar smámansins søk.

**Sosialurin**

## Óhoyrt - ótrúligt

**EGON ØREGAARD**
skúlastjóri



Høgni Hoydal, fyrrverandi landsstyrismaður í mentamálum, heitir í Útvarpi Føroya í gjár, hósdagin 21. juni, á lesandi á Tekniska Skúlanum í Tórshavn um, at "boykotta" próvtøkuna.

Eg gjørdist milt sagt skelkaður, tá løgtingslimurin fyri opnari mikrofon heitir á næmingarnar á Tekniska Skúlanum í Tórshavn um at "boykotta" endaligu próvtøkuna teir skulu upp til í dag.

Hin framhaldandi útbúgvingin á Tekniska Skúlanum í Tórshavn, "Framleiðslutøkningar", var eftir tógvið stríð, serliga við táverandi skúlamyndugleikarnar, har Høgni Hoydal sat sum landsstýrismaður í skúlamálum, sett í verk fyri fyrstu ferð í 2001.

Hesir næmingar hava eins og byggitøkningarnir nú, verið til endaliga próvtøku tríggjar ferðir, har próvdómarar hava verið úr Danmark.

Meðan Høgni Hoydal sat sum landstýrismaður og hevði hægstu ábyrgd fyri próvtøkunum hjá "Framleiðslutøkningunum", fingu næmingarnir onga almenna áheitan frá Høgna Hoydal um at "boykotta" próvtøkurnar. - Hví?

Heldur ikki fekk Tekniski Skúlin í Tórshavn nakra áheitan frá Høgna Hoydal, landsstýrismanni um at útvega føroyskar próvdómarar. - Hví?

Kann hugsast, at grundin var at Høgni Hoydal var landsstýrismaður í skúlamálum og visti, at hetta var hansara ábyrgd? Men hví so ikki taka ábyrgd? og hví nú koma við niðurgerandi illgitingum á leiðsluna á Tekniska Skúlanum í Tórshavn.

Greiða støðan hjá leiðsluni á Tekniska Skúlanum í Tórshavn um, at næmingarnir, so skjótt tað er gjørligt, eiga at fara upp til próvtøku, har teir tosa sítt móðursmál, er fyrr endurgivin í Dimmalætting.

## Ketan er lopin av, Johan Dahl

**FRÍÐÁLVUR JENSEN**



**- onkuntíð undrast ein á, um politikarin yvirhøvur hevur skilt, at vit eru við í eini heimsumfatandi globalisering – við ella uttan Ísland**

Tá vit síggja og lesa tað Johan førir fram, so er tað ikki sørt hugstoytt, at næstformaður Sambandsfloksins ikki kann lata liberalistiska tankan í stevnuskránni sleppa at royna seg – sera hugstoytt!

Vit hava skríggjað eftir eini meira framkomnari vinnu og tænastu, og tá vit nu royna at gera okkum til part av eini globalisering – ella altjóðagerð, so átti tað sanniliga ikki at verði ein trupulleiki hjá borgarliga vonginum í føroyskum politikki – hetta at skapa framburð og ávøkst – í KAPPING við tey, sum bjóða seg fram.

**Føroyska paranoia**
Tað er líkasum, at vit rópa ofta upp um økta tænasta til sámiligar prísir, men tað er eitt ella annað í okkum, sum stríðir ímóti, og tí eiga vit at royna at ressast og síggja eitt sindur longur fram á leið.

Tað er nú fínt við avbjóðingum, Johan, so hvat er veruligi trupulleikin við Hoyvíkssáttmálanum?

Er tú bangin fyri, at vit tapa í KAPPINGINI, ella hvar er tað nú skógvurin klemmar?

**Vit kunnu, Johan!**
Sjálvur havi eg havt mín starvsdag á Kalli, seinastu gott 5 árini, og eg haldi, at vit føroyingar ikki eru verri stillaðir, eftir at Vodafone í Íslandi hevur keypt øll partabrøvini í Kalli – ella fari eg skeivur?

Haldi ikki tað er nakar í Føroyum sum ivast í, at tað er gott við KAPPINGINI á teleøkinum og øðrum økjum, og so átti tað at verði líkamikið, um eitt sindur av íslenskum íkasti er uppií – er tað ikki so?

Tað er nú eisini spurningur um vitan og ikki bara eigaraskap – vit hava so fingið góða hjálp handan vestan – frá íslendsku starvsfeløgum okkara.

Hevði tað verið betri um aðrir áttu og ráddu?

Ella, er tað ikki líka mikið?

Spurningurin er meira, hvussu vit fáa veitt FØROYSKA samfelagnum og borgaranum eina dygdargóða og framkomna tænastu, og so er tað ikki ein spurningur um landafrøðilig mørk, men hvør kann veita tænastuna – í kapping við føroysk virkir og tænastuveitarar – "that´s it".

Tað er nú spell, at grønlendingar ikki koma við, tí tað hevði eisini givið teimum nakað gott og framskygt.

## Prinsipp Jógvans á Lakjuni

**GUNNHILD DAHL**

Í hesum alheimsgerðartíðum er tað, sambært Jógvani á Lakjuni, mentamálaráðharra, ikki eitt afturstig, at vit tosa danskt til munnligar próvtøkur, tí í Íslandi eru tey farin at tosa enskt til próvtøkur. Sambært **prinsippum** Jógvans skulu vit tosa føroyskt til próvtøkur, men tað er eyðsæð bert í prinsippinum. Í okkara "lilleput" alheimsgerð kunnu vit tosa danskt til okkara próvtøkur.

Tað er gott við góðum prinsippum, Jógvan á Lakjuni.

**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Redaktiónsleiðari:** Kári Mikkelsen karim@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Birgir Waag Høgnesen birgir@sosialurin.fo
Joan Abrahamsen joan@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Snorri Brend snorri@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Rólant Waag Dam rolant@sosialurin.fo
Niels Uni Dam nielsuni@sosialurin.fo
Leo Poulsen leo@sosialurin.fo
Dorit Hansen dorit@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Teitur Joensen teitur@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Kykmyndir:**
Alvin Ellebye Andersen alvin@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 og boða frá, leygardag tó frá kl. 11.00-13.00

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin

**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin

**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801

**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn

**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 13[30]

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 09 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39 mm og rúmið millum teigarnar er 4 mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.